



# Wallstickers



Vakurt veggjaprýði

Lætt og ómakaleyst at festa á veggin

Fæst hjá
*www.kulgel.com*

**Kúllurin & Gellan**
Heygsvegur 16
100 Torshavn
+298 210353

---

STARVSLÝSING

## [Endurlýsing] Avloysari fyri kunningarfólk

Fyri kunningarráðgeva okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara til tíðarskeiðið 1. mai 2008 og eitt ár fram.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við stjóran og leiðsluna og umvegis ymiskar miðlar, at skapa opinleika og vitan um dagliga virksemi hjá Landsverki, soleiðis at fólk fáa møguleikan at fylgja við og samstundis fáa eina greiða mynd av Landsverki.

Kunningarráðgevin arbeiðir somuleiðis fyri einum „konstruktivum“ samstarvi við fjølmiðlarnar og syrgir fyri, at Landsverk altíð er til reiðar at veita fjølmiðlunum teir upplýsingar og tað tilfar, teimum tørvar.

At enda er kunningarráðgevin ein tænastuveitari til allar deildir hjá Landsverki, t.d. tá ið kunnandi tilfar skal framleiðast í sambandi við framløgur, ráðstevnur, lýsingarátøk o.a. Kunningarráðgevin tryggjar, at alt kunnandi tilfar frá Landsverki er umboðandi fyri stovnin - bæði í formi og innihaldi.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Kunningarráðgevin vísir beinleiðis til stjóran.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kt-kunnleiki er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars. Merkið umsóknina „Kunningarfólk“, og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð lýsingina.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella ob@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

---

# Farmakonomar til Tjaldurs Apotek

*Vit hava nógv at gera, og mangla farmakonomar at byrja sum skjótast ;o)*



Tú kanst byrja beinan vegin ella eftir avtalu.

Arbeiðið umfatar serliga skranka og reseptur.

Løn eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Farmakonomfelagið.

Ynskir tú at vita meira, kanst tú seta teg í samband við: Kristinu Ejdesgaard ella Petur Oluf Joensen á telefon 34 11 00.

Skrivlig umsókn saman við prógvi og møguligum ummælum sendast til:

Tjaldurs Apotek
Postboks 3010
110 Tórshavn
www.apotek.fo